# Hughes undir trýsti

Mark Hughes hevur tað ikki lætt sum venjari hjá Manchester City. Seinastu seks dystirnar, hevur City bert vunnið einaferð, og nú ganga søgur um, at leiðslan í City er um at missa áltið á venjaranum. Millum teir, sum eru nevndir sum møguligir avloysarar, eru Jose Mourinho og sonur Sir Alex Ferguson, Darren Ferguson. - Eg royni at skapa eitt gott fótbóltslið, og tað hendir ikki frá einum degi til annan, men vit verða noyddir at gera tað betur, sigur Mark Hughes, sum í summar var í Føroyum og spældi ímóti EB/Streymi.



# Arsenal áhugað í heimsmeistarum

Sunda Mirror skrivaði í gjár, at Arsenal er áhugað í at keypa tveir italskar heimsmeistarar í fótbólti. Blaðið vil verða við, at Arsenal er áhugað í álopsspælaranum Vincenzo Iaquinta, sum spælir fyri Juventus, og í miðvallarspælaranum Daniele De Rossi. Sambært Sunday Mirror skulu hesis báðir spælarar geva Arsenal-liðnum eitt sindur av royndum.

VB-Tjaldur 26-21 (10-13):

# VB er avbjóðarin

**Við sannførandi avriki seinasta tíman av dystinum eydnaðist tað VB at vinna við fimm málum á Tjaldrinum. Sigurin hevur við sær, at vágskvinnur eru tær einastu, sum framvegis hanga í Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Tað gekk ikki púrasta eftir ánni alla tíðina. Men tá VB eftir steðgin setti ferðina í topp, megnaði Tjaldur ikki at standa ímóti*

Tað var ein stórur lætti millum flestu áskoðararnar, tá dómararnir bríksladu fyri seinastu ferð í Vági í gjár. Tað, sum í fyrra hálvleiki líktist einum eyðmýkjandi stórtapi fyri Tjaldrinum, endaði við einum rímuliga tryggum sigri til heimaliðið. Men tað kravdi eisini nógv av vágskvinnum.

VB staðfesti í gjár sína støðu sum einasti veruligi avbjóðarin hjá einaráðandi Stjørnuni. Klaksvíkskvinnur bukaði tær av seinast, og tí má fyrimyndarligi stríðsviljin frá vikuskiftinum av álvara finnast fram aftur komandi vikuskiftið, tá oddaliðini bresta saman í Klaksvík.

## Gestirnir klárt omaná

Tað var nú annars als ikki spæl frá leikararum, sum bjóða av til FM-heitið, sum trinu á vøllin í Vági í gjár. Um búðmerkið hjá VB var á troyggjuni, væl at merkja. Tí uppflytararnir úr Tjaldrinum, sum hava lagt bragdliga fyri í hesum kappingarárinum, vóru væl betri. Við Adinu Petrea á odda fóru tær frá heimaliðnum beinanvegin, og eitt skifti vóru runavíkskvinnur framman fyri við 11-3. Hóast venjararnir hjá VB tóku leikararnar til sín í keðiligu gongdini, so bøttist støðan ikki fyrr enn tíggju minuttir restaðu av fyrra hálvleiki. Støðan í hálvleikinum var 10-13 til Tjaldri.

## Stríðsviljin sigraði

Bæði liðini vóru vitandi um týdningin av dystinum. Taparin tapti eisini í oddastríðnum, har vinnarin kundi fylgja Stjørnuni í eina tíð afturat. Og tað tóktist motiverað vertirnar.

VB gjørdi eitt ordiligt hál eftir hvíldina. Toppskjúttin Adina Petrea og Alina Olaru á vitjandi liðnum vórðu báðar mansvardar, og tað gjørdi stóran mun. Tjaldri fekk ongantíð ferð á málskjótingina eftir steðgin, meðan vágskvinnur bitu frá sær. Og frøin var stór, tá Daiva Toumaite miðskeiðis í seinna umfarinum legði heimaliðið á odda fyri fyrstu ferð í dystinum – 19-18.

Og gestirnir kláraðu ongantíð at svara aftur. Orkan gekk undan, samstundis sum sjálvsálitið á heimaliðnum varð størri. Endaliga úrslitið gjørdist 26-21.

## Avgerandi vikuskifti

Kappingin hjá kvinnum byrjar longu at taka skap. VB og Neistin eru, júst sum undanfarin ár, kappingarneytar hjá Stjørnuni. Har afturat roynir Tjaldri at bjóða av.

Komandi vikuskiftið skulu vágskvinnur til Klaksvíkar. Fær VB ikki stig burturúr, so eru longu fýra stig, sum skilja ovastu liðini. Tí hevur tað stóran týdning fyri spenningin, at Stjørnan ikki vinnur sunnudagin. Seinast vunnu klaksvíkskvinnur við átta málum í Vági, og tær mugu eisini metast sum greiður favorittar. Í gjár útspældu føroyameistararnir eisini Kyndil við heili 17 málum.

Hóast kappingin enn er ung - bara fyrsti fjórðingurin av kappingini er lagdur afturum – so sær Stjørnan longu nú út til at besta boðið til ein komandi FM-vinnara.

## FAKTA um dystin

### VB – Tjaldur 26-21 (10-13)

10 min: 3-6
20 min: 5-11
40 min: 14-15
50 min: 21-19
**Málskjúttar**
**VB**: Daiva Toumaite 8 (5), Rannvá Johannessen 6, Laila Jespersen 4, Una Egilsdóttir 3, Gurið Mortensen 3, Bára Mortensen 2
**Útvísingar**: Sára Mortensen 1, Gurið Mortensen 1, Una Egilsdóttir.
**Tjaldur**: Adina Petrea 11, Annika Thomsen 4, Alina Olaru 3, Sara Ann Thomsen 2, Benedikta Jóhannesen 1
**Brotskøst**: VB 7, Tjaldur 2
**Útvísingar**: VB 3, Tjaldur 5
**Dómarar**: Birgir Sondum & Hanus Kúrberg

